UTTANRÍKISRÁÐIÐ
Ministry of Foreign Affairs

Tórshavn 3. mai 2008

Uttanlandsnevnd Løgtingsins
Jenis av Rana, formaður
Tinghúsvegur
100 Tórshavn

Í áliti frá grønlendsku-donsku sjálvstýrisnevndini um sjálvstýri í Grønlandi, almannakunngjørdum í apríl mánaði 2008, er hjálagt uppkast til lóg um Grønlands sjálvstýri, har serliga hesar ásetingar í kapittli 4, § 12, stk. 2 og 7 vekja ans, nú ætlanin er at leggja sjálvstýrislógina til fólkaatkvøðu í Grønlandi:

> *Stk. 2.* Folkeretlige aftaler, der alene vedrører Grønland og Færøerne og fuldt ud angår overtagne sagsområder, kan efter beslutning af såvel Naalakkersuisut som Færøernes landsstyre forhandles og indgås på rigets vegne af Naalakkersuisut og Færøernes landsstyre i forening.
> *Stk. 7.* Folkeretlige aftaler efter stk. 2 indgås på rigets vegne af Naalakkersuisut og Færøernes landsstyre i forening under betegnelsen Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne og Grønland.

Sum endurgivið omanfyri er ætlanin at lóggeva um mannagongdir fyri hvussu Føroyar skulu bera seg at í ávísum millumtjóða samráðingum og sáttmálum. Harumframt er ætlanin at hesar mannagongdir skulu leggjast fyri fólkið í Grønlandi at taka støðu til, áðrenn tær verða setta í gildi.

Eg havi í huga at taka hetta mál upp til máls við grønlendska uttanríkisráðharran í næstum til tess at fáa eina frágreiðing um málið og at umrøða, hvørjir møguleikar eru at broyta hesa áseting.

Áðrenn eg taki hetta stig, fari eg við hesum samsvarandi grein 54 í stýrisskipan Føroya at ráðføra meg við uttanlandsnevndina.

Vinarligar heilsanir

Høgni Hoydal

Høgni Hoydal
landsstýrismaður

26. JUN. 2008